

*Síðan vinnuligur fiskiskapur tók seg upp við Føroyar, hevur Stórabretland verið ein høvuðsmarknaður, serliga fyri tosk og hýsu*

# Okkara støða sum útflytari

**Tað var seinasta hósdag, at Sendistova Føroya í London bjóðaði til almennan fund á Hotel Hafnia, har ein frágreiðing varð løgd fram, sum lýsir toska-og hýsumarknaðin í Stórabretlandi, eins og frágreiðingin eisini lýsir okkara støðu sum útflytari. Stórur áhugi var fyri hesum fundi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í formælinum til frágreiðingina verður víst á, at nógv orðaskifti seinastu árini hevur verið um lutfalsliga stóra vøksturin í útflutningi av óvirkaðum toski og hýsu úr Føroyum til Stórabretlands. Ymiskar áskoðanir eru um, hvør orsøkin er til hesa gongd, og hvørt hetta fyribrigdi er ein trupulleiki ella ikki.

## Høvuðsmarknaður

– Vit hava sum partur av okkara virksemi fylgt gongdini í fiskivinnuni í Stórabretlandi seinastu árini, og greitt er, at stórar broytingar eru farnar fram. Talan er um broytingar í alheimssamfelagnum og lokalt í Stórabretlandi, sum ávirka føroyska fiskivinnu.

Í frágreiðingini verður sagt, at síðan vinnuligur fiskiskapur tók seg upp kring Føroyar, hevur Stórabretland verið ein høvuðsmarknaður fyri serliga tosk og hýsu.

– Vit hyggja serliga at rákinum á hesum marknaði, og hvussu vit kunnu vænta, at føroysk fiskivinna verður ávirkað av hesum.

## Vánalig útlit

Frágreiðingin lýsir føroyska útflutningsmynstrið, bæði hagtalsliga og við atliti at marknaðinum. Ein viðgerð er av føroysku kappingarstøðuni, og mett verður um framtíðarútlit.

Sendistova Føroya heldur, at sum útlitini eru í løtuni, er støðan ikki so bjørt.

Tí verður eisini spurt í frágreiðingini, "Hvat er til ráða at taka?" (sí seinastu teigarnar á næstu síðu)

# Bretland er ógvuliga bun

**– Samstundis, sum landingarnar hjá bretsku fiskiførunum alsamt eru minkaðar, er eftirspurningurin hjá brúkarunum eftir sjóføðslu í støðugum vøkstri. Hetta merkir, at Stórabretland er vorðið ógvuliga bundið at innfluttari rávøru. Tó hava minkandi landingarnar og vaksandi eftirspurningurin ikki elvt til munandi príshækkingar, tí ein stórur partur av innflutninginum kemur úr láglønarsamfeløgum, sigur Sendistova Føroya í London**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Menningin í nýtsluni av sjóføðslu er vaksandi, bæði í ídnaðarlondum og í menningarlondum. Miðalnýtslan av sjóføðslu er økt úr 0,9 kilo fyri hvønn íbúgva í 1961 upp í 16,1 kilo í 1997. Í ídnaðarlondunum øktist miðalnýtslan úr 19,7 kilo upp í 27,7 kilo fyri hvønn íbúgva í sama tíðarskeiði.

FAO metir, at samlaða heimsveiðan fer at røkka umleið 107,6 miljónum tonsum í ár 2030, og samlaða framleiðslan í alivinnuni verður mett at økjast munandi - úr umleið 28,6 miljónum tonsum í 1997 upp í 82,6 miljónir tons í 2030.

Í frágreiðingini hjá Sendistovu Føroya í London verður víst á, at størsta íkastið til økingina í fiskaframleiðsluni væntandi kemur úr alivinnuni. Hinvegin verður íkastið frá fiskiveiði til samlaðu fiskaframleiðsluna treytað av, hvussu effektiv fiskiveiðiumsitingin verður.

– Um framstig verða gjørd í umsitingini av núverandi fiskastovnum, ið eru ovurfiskaðir, kann hetta merkja eina øking í framleiðsluni við millum 5 og 13 miljónum tonsum. Hinvegin vil áhaldandi ovurfisking hava við sær eina minking í framleiðsluni.

## Nýtsluhættir

Frágreiðingin viðger eisini etivanar og keypsmynstur, og ásannað verður, at hesir verða ávirkaðir av nýggjum vørum og nýggjum lívshættum.

– Tað er umráðandi hjá føðsluídnaðinum at vera ansin og varugur við hesi rákini, tí hesi ávirka sambandið millum nýtaran og vørurnar.

Víst verður eisini á, at tøl frá søluliðnum avdúka nøkur av teimum rákum, ið gera um seg í løtuni, og samanumtikið eru hesi: 1. Vaksandi útboð av høgleikavørum, 2. Øking í útboðnum av feskum køldum vørum, 3. Vaksandi áhugi fyri eksotiskum fiskavørum, 4. Vørurnar hava sum heild longri haldføri, 5. Alt fleiri vørur eru feskar og portiónspakkaðar, 6. Vaksandi áhugi fyri góðsku og føðitrygd og 7. Brúkarar tykjast at vera meira upptiknir um heilsuviðurskifti.

– Viðvíkjandi skipanini av søluni og veitingini av føðslu, so er týðiligasta rákið tann áhaldandi flytingin frá smærri sølustøðum til enn størri sølu- og handilsmiðstøðir og handilsketur. Í ávísum londum umboða handilsketurnar í dag meira enn 60% av samlaðu matsøluni.

Í frágreiðingini verður sagt, at valdið hjá handilsketunum er gjølliga kannað og staðfest seinastu árini.

– Tað gerst enn meira umráðandi at laga seg eftir rákinum í hesum handilsstøðum, nú ein alsamt størri partur av handlinum fer um tær stóru altjóða fyritøkurnar.

## Toskur og hýsa

Toskur og hýsa eru tvey týdningarmikil fiskasløg í altjóða hvítfiskamarknaðinum, sum fevnir um fleiri fiska- og vørusløg.

– Hvítfiskamarknaðurin er sera fløktur við eini truplari og skiftandi virðisketu.

Víst verður á, at seinastu fimti árini hevur samlaða útboðið av hvítfiski verið skiftandi millum 3 og 11 miljónir tons.

– Veiðan øktist munandi árini 1950-1974, men síðan kom ein bráðlig niðurgongd í talinum av landingum. Talið øktist aftur so við og við, og vóru landing-arnar í hæddini í 1987 við 11,5 miljónum tonsum. Minsta nøgdin seinastu 20 árini var í ár 2000 við bert 5,9 miljónum tonsum. Síðan 1985 hevur altjóða útboðið av hvítfiski verið minkandi, og FAO metir, at eitt framhaldandi fall verður í útboðnum av hvítfiski.

Tað er serliga minkingin í veiðini eftir Alaska pollock, sum hevur ávirkað afturgongdina. Í 1986 vórðu landað umleið 7 miljónir tons av Alaska pollock, men hesar landingar minkaðu niður í bert 3,1 miljónir tons í 2001.

– Landingar av toski eru eisini minkaðar munandi seinastu 30 árini. Tær vóru í hæddini í 1968 við yvir 4 miljónum tonsum, men í ár 2000 vóru samlaðu landingarnar minni enn 1 miljón tons.

Víst verður á, at veiðan í